# FERÐAVINNAN 2010

## ÁRSFRÁGREIÐING

Ferðavinnufelagið

Smærugøta 9A, 100 Tórshavn, Tlf. 73 99 04,  Fax 30 99 01, ferdavinnufelagid@gmail.com

# Innihaldsyvirlit

**Frágreiðing frá samskipara** ---------- 3

**Lýsing av ferðavinnuni** ---------- 4

**Data innsavnan** ---------- 5

**Árið 2010** ---------- 6

**Ferðavinnan 2010, mett virði** ---------- 8
Hagtøl fyri 2010 (2003 og 2009) ---------- 9
Gistingar á føroysku gistingarhúsunum (nætur) ---------- 9
Innskrivingar á føroysku gistingarhúsunum (persónar) ---------- 9
Millumlanda ferðafólkaflutningur ---------- 9

**Útlit fyri 2011** ---------- 10

**Tilmælir** ---------- 11
Marknaðarføring ---------- 11
Vinnulig átøk ---------- 12
Almen átøk ---------- 13

**Samanumtikið** ---------- 14

**Verkætlaninar** ---------- 14
Verkætlanar - gongdin ---------- 14
Hagtalsskipan ---------- 15
Hagtøl ---------- 15
Greining av ferðavinnuni ---------- 15
Lýsing av greiningar verkætlanini ---------- 15
Kortlegging av sambandinum við Visit Faroe Islands ---------- 16

**Appendix** ---------- 17

**Nevndin í Ferðavinnufelagnum er mannað av:**
Jákup Sverri Kass, formaður
Henny á Líknargøtu, næstformaður
Jóhanna Rasmussen
Fríðunn Hansen
Finn Johannesen
Eirik Suni Danielsen, tiltakslimur

Samskipari: Dagmar S. Joensen

## *Frágreiðing frá samskipara*

Seinastu seks mánaðirnar havi eg havt møguleikan burturav at arbeiða við verkætlanum innan føroyska ferðavinnu. Hetta hevur verið sera spennandi arbeiði, og nú verður so eitt úrslit lagt fram, sum lýsir týdningin av ferðavinnuni í føroyska búskapinum umframt greiningar av ferðavinnuni og tilmælir.

Á Ferðavinnudegnum í Klaksvík í september nevndi eg, at ferðavinnan er eitt tilfeingi ið ikki er troytt til fullnar. Hetta var eitt uppáhald sum so nógv annað, tá tosað hevur verið um ferðavinnuna í Føroyum, tí tað er ein sannroynd, at tøk skjalfesting um verandi støði og gongdina seinnu árini hevur verið avmarkað. Men uppáhaldið standi eg við, bæði tí at verandi kapaitetur í gisting og flutningstólum kann gagnýtast betur, og tí at alt avleitt virksemi antin er tøkt ella skjótt kann laga seg til øktan eftirspurning serstakliga í láárstíð.

Vit hava eitt tænastustøðið í loftvegis og sjóvegis sambandinum við útheimin, sum heimamarknaðurin ikki ber einsamallur. Tað sama ger seg galdandi í gistingarmøguleikum, matstovum, upplivingum og øðrum tænastum, ið ferðafólk nýta, tá tey vitja í Føroyum. Luturin av útlendskum ferðafólkum er á einum støðið, at týðandi upphæddir liggja eftir í tænastum, føroyska samfelagið ikki kann vera fyriuttan.

Hesu seinastu sjey árini hava vit havt vøkstur í ferðafólki til Føroya, og nú ber til at staðfesta, at ferðavinnan er ein týðandi táttur í føroyska búskapinum. Hóast hetta er lønsemið í vinnuni ov lágt, og tørvur er tí lutvíst á fleiri ferðafólkum og lutvíst at fáa øktar inntøkur fyri hvørt ferðafólki. Hetta er avgjørt møguligt, men krevur miðvísa marknaðarføring, gott samstarv í vinnuni og ímillum vinnuna og almennar mynduleikar. Harafturat er neyðugt, at føroyska fólkið og náttúran, sum eru hornasteinar í ferðavinnuni, eru tilreiðar at taka ímóti hesi avbjóðing.

Ferðavinnan skal takast í álvara! Her eru munadyggir inntøkumøguleikar, men eisini stórar avbjóðingar.

Eg fari at nýta høvi til at takka gistingarhúsum, vallaraheimum og kunningarstovum, incoming fyritøkum, Smyril Line, Atlantic Airways, Visit Faroe Islands og Hagstovu Føroya fyri gott samstarv og fyri at hava latið mær alt tað tilfar, eg hevði brúk fyri. Eisini fari eg at takka veitarum í upplivingarvinnuni og annars øllum limunum í Ferðavinnufelagnum fyri at hava víst mær álit og givið mær innlit í teirra fyritøkur og hesa spennandi vinnugrein. Síðst men ikki minst fari eg at takka starvsfeløgum í Vinnuhúsinum fyri góð ráð og viðmerkingar.

Dagmar S. Joensen

## *Lýsing av ferðavinnuni*

Fyri fyrstu ferð síðani 2003 eru hagtøl fyri ferðavinnuna tøk. Samanbering við 2010 vísir ein munandi vøkstur bæði í gistingum og í sjóvegis og loftvegis flutningi av ferðafólki. Talið av fráferðum um flogvøllin er økt, eins og kapasiteturin á sjóvegis sambandinum við útheimin er munandi hækkað hesa tíðina. Hetta hevur verið gongdin í einum tíðarskeiði, har vit bæði hava sæð búskaparvøkstur, sum toppaði í 2007 og 2008, afturgongd í 2009 og so aftur ein vøkstur í 2010. Gongdin sæst aftur í avleiddum vinnum so sum matstovum, innlendis flutningi, upplivingum, handlum osv., men hevur eisini verið við til at skapt grundarlag fyri nýggjum átøkum serliga í matstovu og upplivingarvinnuni. Afturgongdin í 2009 saman við størri útboði av veitarum hevur skapt harðari kapping millum veitarar og sum fylgja av hesum bæði fjølbroyttari tænastu útboð, men eisini priselastisitet og lækkandi inntjening í pørtum av vinnuni.

Ferðavinnan er í stóran mun ein útflutningsvinna. Týðandi fremmand gjaldoyra ella pengar, vunnir í øðrum londum, verða brúktir uppá tænastuveitingar innlendis í Føroyum og uppá at koma til og frá landinum. Týdningurin fyri føroyska búskapin er tí ikki til at koma uttanum bæði í beinleiðis og avleiddum virksemi.

Serligt við ferðavinnuni er, at hon hevur tørv á at kalla øllum tænastuveitingum, neyðugar í einum nútímans samfelag, og er í fleiri førðum ein fortreyt fyri at tænastuveitingar eru lønandi. Vinnan er soleiðis grundarlagið undir okkara millumlanda samferðslu, gistingarhúsum, matstovuvinnuni og upplivingarvinnuni, og er við til at lyfta tænastustøði øllum føroyingum at gagni. Harafturat leggja ferðafólk týðandi upphæddir í innanoyggja samferðslu, samskifti og í aðrar tænstur, sum ikki beinleiðis eru rættaðar at ferðavinnuni. Hesar veitingar eru undirstøðukervi í einum framkomnum ferðamáli og ein fortreyt fyri, at Føroyar kunnu bjóða seg fram sum eitt skipað ferðamál. Nógvir partar við sera ymiskum fortreytum og ikki altíð við samanfallandi áhugamálum eru bundnir at tænastum hvør frá øðrum, bæði í privata og almenna geirðanum, og hetta kann verða ein avbjóðing í sjálvum sær.

Frágreiðingin lýsir árið 2010 í hagtølum og virði, hevur nakrar afturlítandi samanberingar og gevur boð uppá møguligar vegir at ganga til tess at skapa vøkstur. Gingið verður ígjøgnum tær verkætlanir arbeitt hevur verið við, og hvussu hesar kunnu verða við til at lyfta nakrar yvirskipaðar uppgávur í ferðavinnuni.

## *Data innsavnan*

Frágreiðingin tekur støði í innsavnaðum tølum fyri 2009 og 2010 frá flestu føroysku gistingarhúsum, vallaraheimum, kunningarstovum og øðrum veitarum t.d. in-coming fyritøkum, havnamyndugleikum v.m. Fleiri tøl hava ikki áður verið tøk alment, og tí er í hesum førinum einki beinleiðis samanberingargrundarlag. Har samanbering er gjørd, eru tøl hjá Hagstovu Føroya nýtt. Til tess at fáa eina fullfíggjaða mynd hava samrøður verið við veitarar í ferðavinnuni og við mynduleikar, har miðjað hevur verið ímóti at fáa eina afturlítandi mynd, eina støðumynd og nakrar metingar um framtíðina. Talan er um samrøður og ikki beinleiðis interview.

Ein fíggjarlig meting er gjørd yvir beinleiðis ískoyti frá ferðavinnuni í 2010 til føroyska búskapin, har støði er tikið í innsavnaðu tølum frá gistingum, innskrivingum á gistingarhúsini og millumlanda ferðafólkaflutningi. Við tað at hesi hava beinleiðis ávirkan á avleiddar vinnur, eru varisliga mett miðaltøl sett á gistingar, millumlanda- og innlendis flutning, mat og upplivingar.

Støðið er tikið í UNWTO[1] allýsingini av ferðafólki, sum sigur, at eitt ferðafólk er "*fólk ið ferðast til og búgva á støðum uttanfyri teirra vanliga umhvørvi í meiri enn fýraogtjúgu (24) tímar og ikki longri enn eitt ár samanhangandi til frítíðar-, handils- ella annað virksemi, ið ikki hevur samband við útinnan av virksemi lønt á staðnum, har vitjað verður*". Fólk ið ferðast í egnum landi eru tí við, í tann mun tey eru skrásett á gistingarstøðum. Hagtølini annars taka útgangsstøði í TSA (Tourist Satellite Acount).

Til tess at gera frágreiðingina smidligari er heiti "kundi" av og á nýtt um ferðafólk og "veitari" um tænastuveitarar til ferðafólk. Undirstøðukervi er millumlanda flutningsfeløgini, gistingarhús og aðrir gistingarmøguleikar, matstovur, in-coming fyritøkur, upplivingarvinnan og innlendis flutningur.

[1] http://unwto.org/en

## *Árið 2010*

Vøkstur var í ferðavinnuni í 2010, bæði tá hugsað verður um gistingar, og tá hugsað verður um sjóvegis ferðafólk. Loftvegis var fyrra hálvár ein minking orsaka av øsku úr Eyðafjallajøkul, sum javnaði seg í seinnu hálvu. Serliga sjónligt er, at ferðafólk hava gist fleiri nætur í meðal enn í 2009, og harafturat er ein rættuliga fittur vøkstur í gistingum í mun til 2003 (árið 2003 verður nýtt til samanberingar, tí hetta er seinasta árið, Hagstova Føroya hevur almannakunngjørt hagtøl fyri ferðavinnuna). Aðrir beinleiðis veitarar so sum matstovuvinnan, upplivingarvinnan og innlendis flutningskervi mega somuleiðis metast at hava havt øking í inntøkunum. Einkult ár undantikin, er nøgdin av cruise skipum vaksin síðani 1999, men seinnu árini hevur økingin verið minni og í 2009 ein afturgongd, sum tó vendi aftur í 2010, tá 50 ferðamannaskip komu á Havnina og Runavík.

Við støði í savnaðu hagtølunum fyri 2010 er ein varðislig meting gjørd av ískoyti hjá ferðavinnuni til føroyska búskapin. Metingin er kr. 775,6 mill., og til samanberingar kann nevnast, at útflutningsvirði av uppisjóvarfiski varð kr. 800 mill.[2] og hjá alivinnuni varð kr. 1,33 milliardir[3] í 2010. Ferðavinnan er sostatt ein týðandi táttur í føroyska búskapinum við framhaldandi vakstrarmøguleikum um rætt verður atbori.

Vøksturin hesi seinastu sjey árini er tekin um menning sum heild í vinnuni og ein staðfesting av vakstrarmøguleikum hjá ferðavinnu í Føroyum. Men tað er ein greiður skilnaður millum heildarmyndina og so støðuna hjá einstøku veitarunum, ið er nógv tyngd av høgum kostnaðarstøði og almennum avgjøldum. Inntøkurnar eru smábýttar, tí vinnan er samansett, og kappingin er hørð, bæði millum veitarar í Føroyum og á altjóða marknaðinum. Einstøku veitararnir í ferðavinnuni hava tí ikki í sama mun merkt hesa framgongd og stórur avlopskapasitetur er partar av árinum.

Hinvegin sæst vøksturin aftur í munandi fleiri veitarum, størri útboði av tænastum og hækkandi tænastustøði í matstovuvinnuni og upplivingarvinnuni. Harafturat eru stórar íløgur gjørdar í nýggj vinnutól bæði á sjógvi og landi. Á støðum, har ferðafólkastreymurin er stórur, sæst, at tænastuvinnan er í vøkstri, og góð dømi um hetta eru Havnin sum matstovumiðdepil og Vestmanna, sum í nógv ár hevur havt støðugt vaksandi ferðafólkavirksemi. Skipaðar náttúruupplivingar eru annars væl spjaddar kring landið, meðan gistingarhúsini og náttarlív í stóran mun eru miðsavnaði.

Av øðrum avleiddum vinnum hevur handilsvinnan stóran týdning. Nevnast kann, at 205 handlar eru partar av eini Tax-free skipan, og í 2010 var søla fyri kr. 14,8 mill. skrásett umvegis hesa skipan við eini miðal sølu uppá kr. 983,- fyri hvørja avgreiðslu. Hetta eru aðrir handlar enn matvøruhandlar, sum eisini mugu roknast sum týðandi veitarar til ferðafólk.

Samlaðu inntøkurnar av ferðavinnuni í 2010 eru mettar til kr. 775,6 mill. Av hesum stava stívliga kr. 100 mill. frá gisting, kr. 78 mill frá matsølu, upplivingum og aðrari sølu meðan

[2] Felagið Nótaskip
[3] Føroya Havbúnaðarfelag

cruise vinnan er mett til kr. 20 mill. Sjóvegis og loftvegis flutningur av inngangandi ferðafólki var kr. 223,2 mill og útgangandi kr. 339,9 mill. (sí talva 2, síða 8)

Samanumtikið eru inntøkurnar lutaðar út á eina langa røð av veitarum, frá landsins størstu fyritøkum til einstaklinga virksemi og allar støddir harímillum – almennar og privatar. Lønsemið er sum heild ikki nøktandi, og hetta er ein avbjóðing, sum má loysast. Framgongdin, ið kann staðfestast hesi seinnu árini, er tekin um, at Føroyar eru vornar kendar og áhugaverdar sum ferðamál, og hetta viðrák eigur at nýtast til at skapa enn størri vøkstur.

Ferðafólk við Norrønu og innskrivingar á gistingarhús 2010




Talva 1

## *Ferðavinnan 2010, mett virði*

| | | |
|---|---|---|
| **Samlaðar inntøkur** | | **775,6** |
| **Inngangandi ferðaseðlasøla** | **223,2** | |
| **Útgangandi ferðaseðlasøla** | **339,9** | |
| **Ferðaseðlasøla samanlagt** | | **563,1**[4] |
| **Gistingarhús** | **92,8** | |
| **Summarhús** | **4,6** | |
| **BB, kamping og tjalding** | **0,6** | |
| **Gisting samanlagt** | | **98,0**[5] |
| **Matur** | | **46,6**[6] |
| **Innlendis flutningur** | | **16,3**[7] |
| **Upplivingar** | | **16,7**[8] |
| **Tax Free** | | **15,0**[9] |
| **Cruise** | | **20,0**[10] |

Talva 2

***Í 2010 rindaðu Smyril Line og Atlantic Airways samanlagt kr. 18 mill. í ferðaavgjøldum.***

[4] Keldur: Atlantic Airways og Smyril Line
[5] Keldur: Gistingarhús, vallaraheim, in-coming, kunningarstovur
[6] Nøgd av gistingum x kr. 300,- (meting)
[7] Oyggjaleiðir, tunnilsgjøld, bilútleigan, hýrivognar v.m. Mett við støði í nøgd av inngangandi ferðafólki x kr. 350,-
[8] Nøgd av inngangandi ferðafólki x kr. 360,-
[9] Kelda: Euro Refund
[10] Meting

## Hagtøl fyri 2010 (2003 og 2009)

Hagtøl í ferðavinnuni eru eitt stýringsamboð og ein máti at sjónliggera ferðavinnuna í føroyska samfelagnum. Neyðugt er at vita, hvaðani fólk koma, hvussu nógv tey eru, hvussu tey gista, hvat tey gera v.m. Nøkur hagtøl eru rímiliga løtt at fáa fatur á, meðan onnur krevja spurnarkanningar. Hagtøl vísa yvir tíð eina gongd ella menning, og tí mugu skrásetingar skipast á sama hátt og savnast við jøvnum millumbili. Hetta hevur ikki verið gjørt tey seinnu árini, men nú eru so nøkur hagtøl fyri 2009 og 2010 tøk.

Rættuliga neyv hagtøl eru tøk frá gistingarhúsunum í 2010. Talan er um innskrivingar t.v.s. tal á persónum ið hava gist og teirra heimstað. Harafturat er tal á gistingum skrásett antin beinleiðis ella sum eitt miðaltal. Eisini á ferðafólkum, ið koma sjóvegis, eru neyv hagtøl fyri tal og heimstað. Skrásetingin á flogvøllinum, har størsti parturin av ferðafólkunum koma til landið, er hinvegin ikki nøktandi, men Atlantic Airways hevur gjørt kanningar, sum vísa nakrar høvuðsbólkar.

Í talvu 1 sæst, at útlendsk ferðafólk, ið koma sjóvegis til landið, og skrásetingarnar hjá gistingarhúsunum er neyvt samanfallandi og ein góð mynd av hvaðani ferðafólkini koma.

Frá 2003 til 2009 kann stór broyting staðfestast (sí talvur niðanfyri), og sum áður nevnt sæst hetta ikki í sama mun aftur hjá teimum gistingarhúsum, sum hava verið í vinnu hesi árini. Ein orsøk er, at einstøk gistingarhús í nøkur ár lótu inn “innskrivingar” í staðin fyri “gistingar” til Hagstovuna, og hesin feilur ávirkar talið fyri 2003 niðureftir. Harafturat er stór øking í gistingar kapasiteti, m.a. er Hotel Streym komið afturat og Gjáargarður hevur bygt út. Aftaná at nýggja Norrøna varð tikin í nýtslu í apríl 2003, koma fleiri av sjóvegis ferðafólkunum við kampingvognum, og hjá in-coming fyritøkum er “summarhús og billeigan” vorðin ein vælumtóktur pakki.

Samanumtikið kann sigast, at økta útboðið av gistingarmøguleikum hevur havt við sær, at kappingin á gistingarøkinum er harnað. Tískil sæst vøksturin seinastu árini ikki aftur í sama mun í úrslitunum hjá einstøku veitarunum.

### Gistingar á føroysku gistingarhúsunum (nætur)

| | 2003 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| Gistingar | 89.969 | 109.210 | 132.536 |
| Index | 100 | 121,4 | 147,3 |

### Innskrivingar á føroysku gistingarhúsunum (persónar)

| | 2003 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| Innskrivingar | Eingi tøl tøk | 57.672 | 58.020 |
| Index | | 100 | 100,6 |
| Dagar gist í miðal | | 1,9 | 2,3 |

### Millumlanda ferðafólkaflutningur

| | 2003 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| Ferðafólk | 213.288 | 260.228 | Endalig tøl ikki tøk |
| Index | 100 | 122,1 | |

Kelda: Hagstova Føroya

## *Útlit fyri 2011*

Tað er misjavnt, hvussu teir ymisku veitararnir meta árið. Smyril Line hevur fleiri bókingar enn somu tíð seinasta ár, og onkur gistingarhús hava munandi fleiri bókingar, men sum heild hava gistingarhúsini higartil fingið færri bókingar. In-coming feløg hava somuleiðis fáar bókingar. Kortini er eitt ávíst bjartskygni at hóma. Hetta er grundað á, at støðan var tann sama hesa tíðina í fjørð, og árið royndist kortini væl, tá saman um kom. Ferðir verða ikki í sama mun sum fyrr lagdar til ræettis í góðari tíð, men eru tættari uppá fráferð, eisini til fjarðskotin ferðamál sum Føroyar. Nógv verður júst nú lagt fyri í marknaðarføringsátøkum bæði hjá Smyril Line, Atlantic Airways, gistingarhúsum in-coming fyritøkunum og Visit Faroe Islands.

Gistingarhúsini hava í nøkur ár rættað marknaðarføring at fundar- og ráðstevnumál-bólkinum fyri mánaðirnar apríl, mai og september. Hetta byrjaði verðuliga at geva úrslit í 2010, men fekk ein bráðan enda orsaka av øskuni úr Eyðafjallajøkuli. Arbeiðið heldur kortini áfram, og vónandi síggjast úrslit av hesum í ár og komandi árini.

Fleiri størri vinnulig tiltøk eru á skránni í 2011. Nevnast kunnu North Atlantic Fish Fair, eitt vinnuligt tiltak, sum verður í apríl, Visit Faroe Islands í mai og Vest Norden Travel Mart í september, ferðavinnustevnur, sum marknaðarføra ávikavist Føroyar einsamalt og Føroyar saman við Íslandi og Grønlandi. Vinnulig tiltøk sum hesi saman við ítróttar- og mentunarligum tiltøkum skapa eina orsøk hjá ferðafólki at koma til landið. Flestu eru byrjaði sum tiltøk fyri føroyingar, men eru somikið vælskipaði, at tey kunnu marknaðarførast uttanlands.

Samanumtikið er orsøk til eitt ávíst bjartskygni fyri 2011. Miðvís marknaðarføring er í gongd, og afturmeldingar frá stevnum uttanlands hava higartil verið góðar. Hetta skuldi, sum frá líður, farið at sæst aftur í virkseminum hjá veitarum í ferðavinnuni.

**Útlendsk ferðafólk - høvuðsbólkar**



## *Tilmælir*

Føroyski búskapurin hevur verið merktur av stórum sveiggjum, serliga tá bæði havtilfeingið hevur svikið, og prísirnir á heimsmarknaðinum hava verið lágir. Hesi sveiggj hava havt ógvusligar fylgjur fyri livikorini í landinum, og tørvurin á nýggjum vinnugreinum er eygsýndur. Tilfeingið í ferðavinnuni er okkara náttura, mentan og fólk. Við tilvitaðari og skilagóðari nýtslu er náttúran eitt støðugt tilfeingi, og tí er vinnan ein veruligur møguleiki at fjøltátta búskapin. Hinvegin ávirkast ferðavinnan eisini av konjunktursveiggjum, og tí er alneyðugt at undirstøðukervi er fíggjarliga sterkt. Men her er langur vegur á mál, tí hóast vinnan hevur eitt árligt útflutningsvirði á hædd við tættir í fiskivinnuni[11], eru inntøkur og rakstrargrundarlag hjá fyritøkunum í vinnuni (undirstøðukervi) ikki nøktandi.

Til tess at tryggja ferðavinnuna sum eina varandi vinnugrein, til reiðar at taka ímóti vøkstri og standa ímóti búskaparligum sveiggjum, er neyðugt at styrkja fíggjarliga grundarlagi undir fyritøkunum, samstundis sum náttúruvarveitandi átøk verða sett í verk. Hetta má gerast bæði av vinnuni sjálvari, almennum mynduleikum og samstørvum millum partarnar. Økini kunnu deilast í trý:

***Marknaðarføring, vinnulig átøk og almenn átøk***

## Marknaðarføring

Inntøkurnar av ferðavinnuni mugu økjast. Aðalmálið við marknaðarføringini er at fáa fleiri ferðafólk til landi, meðan tað eru teir einstøku veitararnir, ið syrgja fyri, at sum mest fæst burturúr. Tað er kostnaðarmikið at koma til Føroyar, og tí kann roknast við, at talan er um fólk, ið hava eina rímuliga keypiorku.

Stórar upphæddir verða hvørt ár nýttar av vinnuni til at marknaðarføra Føroyar. Átøkini eru miðrættaði at ferðafólki, ið eru mest sannlík at koma til landið. Talan er í fyrsta lagi um lond, har Føroyar hava beinleiðis loftvegis ella sjóvegis samband, men eisini aðrar marknaðir í Europa. Hagtølini fyri 2009 og 2010 vísa, at Danmark er nógv størsti marknaðurin meðan í restini eru Ísland, Noreg, Bretland, Týskland og Holland teir størstu.

Tann sokallaða etniska ferðslan er áleið 30% av ferðafólkunum, sum koma til Føroyar. Hetta eru føroyingar búsitandi aðrastaðni, ið vitja heimaftur. Hesin bólkur er rættuliga støðugur bæði sjóvegis og loftvegis og krevur ikki marknaðarføring av týdningi. Tey gista hjá familju og kenningum, og nýta vanliga ikki gistingarhúsini.

Havninar í Havn og Runavík saman við veitarum til cruise vinnuna marknaðarføra Føroyar á messum í USA og Europa. Her er gjørt eitt miðvíst og áhaldandi arbeiði, ið kann leiðast aftur til 1992, tá Tórshavnar Havn byrjaði. Tað er serliga aftaná aldarmótið, at arbeiðið hevur givið úrslit, og er gott dømi um, hvussu drúgt tað er at byggja upp nýggjar marknaðir.

[11] Útflugnings virði 2010: Uppisjóvar vinnan, kr. 800 millonir, Alivinnan, kr. 1,33 milliardir.
Keldur: Felagið Nótaskip og Føroya Havbúnaðarfelag

Skynað verður ímillum frítíðar ferðafólk, fólk sum koma í arbeiðsørindum t.d. á fundir og rástevnur og so tiltøk t.d. vinnulig tiltøk, ítróttartiltøk ella mentunartiltøk. Frítíðar ferðafólk vitja í juni, juli og august, til páskir og til jólar, meðan fólk sum t.d. hava arbeiðsørindir koma aðrar tíðir á árinum. Til tess at gagnnýta kapasitet á gistingarhúsum og í flutningsfeløgunum optimalt er neyðugt at fáa vitjandi, ið kunnu koma aðrar tíðir. Tí er partur av marknaðarføringini rættað at øðrum málbólkum, og tað hevur soleiðis eydnast gistingarhúsum seinastu árini at leingja háárstíðina við fundum og rástevnum í apríl, mai og september.

At leingja háárstíðina gerst ikki av ferðavinnuni einsamallari. Her er neyðugt at allir føroyingar, sum virka í millumlanda samstørvum, arbeiða fyri at fáa rástevnur ella fundir at verða í Føroyum. Almennir mynduleikar eiga eina serliga ábyrgd at syrgja fyri, at allir fundir ella samráðingar, har Føroyar eru vertir, eru í Føroyum.

Alt fleiri brúka alnótina til at finna ferðamál, leggja til rættis ferðina og keypa ferðaseðlar, gisting o.a., tey ætla at uppliva á ferðini. Hesin málbólkur kann vera hvar sum helst og hvør sum helst. Tey nýta alnótina og samskifta nógv við veitarar fyri at tryggja, at tey kunnu seta saman ein "pakka", ið nøktar teirra serliga tørv, áðrenn ferðin verður bíløgd. Nýggjar marknaðarkanningar vísa[12], at ferðafólk eru og verða alt meira trupul at flokka í greiðar málbólkar (segmentir), og at gistingarhús og aðrir veitarar mugu verða til reiðar at nøkta eina breiða viftu av ynskjum, bæði tá tað snýr seg um tøkni, mat og upplivingar. Neyðugt er við eini heimasíðu (landing page) í hesi marknaðarføring, og sum skilst arbeiðir Uttanríkisráðið við eini loysn.

## Vinnulig átøk

Vinnan má laga seg eftir at skapa eina støðugt betri tænastu og at menna tilboðini. Málið má verða at hækka úrtøkuna fyri hvørt ferðafólk við at effektivisera tænastuna. Harafturat eigur at verða samsvar millum prísir, tænastustøðið og eftirspurning, og so hvørt tænastustøðið og/ella eftirspurningur hækkar, eiga prísirnir at hækka. Ein góð regla er at endurskoða prísir við jøvnum millumbili og at leggja smærri hækkingar á. Harafturat má gjald takast fyri allar tænastur og upplivingar, og neyðugt er at hava vaki eyga við hvat marknaður og náttúra bera[13].

Góðskueftirlit og trygdarfyriskipanir eru trupular at fremja í ferðavinnuni, men kortini avgerandi fyri at fáa eina nøktandi og trygga tænastu í øllum liðum. Ferðavinnufelagið er farið undir at gera eina greining av veitarum í ferðavinnuni, sum, tá hon er víðariment, letur upp fyri møguleikum fyri at veitarar fáa góðskuátekning. Sum er, mugu feløgini tó sjálvi finna skipanir, ið tryggja, at tænastur verða veittar sum avtalað. Eru frávik, mugu hesi takast upp við veitara, so skeivleikar verða rættaðir. Veitararnir mugu seta nøkur minsta krøv sínamillum, sum t.d. at ein tíð kann avtalast og haldast eisini langt fram í tíðina, at amboð, hús, bygningar, bátar, bilar og bussar v.m. eru í lagi, lúka øll heilsu- og trygdarkrøv og eru rein og nosslig. Harafturat skulu køn fólk verða við, tá farið verður í fjøll ella á sjógv.

Formligar trygdarfyriskipanir, nátturuvernd og góðskueftirlit eru yvirskipaðar verkætlanir, ið mugu setast á skránna hjá Ferðavinnufelagnum, raðfestast og loysast í samstarvi við veitarar og mynduleikar.

---

[12] Hotels 2020: Beyond Segmentation. Strategies for growth in an era of personalization and global change. (Fast Future og Amadeus)

[13] Dømi Mykines: Í 2005 vóru 2.877 ferðafólk, 2008 10.160 og í 2010 8.297. Kelda: SSL.fo og Vága Kunningarstova

Náttúran er viðbrekin og krevur skynsama nýtslu. Tað finnast skipanir fyri ferðavinnu, ið fevna um bæði vistfrøði og góðskueftirlit t.d. Qualmark[14]. At seta slíkar skipanir í verk er kostnaðarmikið og krevur stórt engagement frá vinnuni sjálvari. Men sum frálíður mugu

Føroyar seta í verk eina vistfrøðisliga skipan, ikki minst fyri at verja nátturutilfeingið men eisini tí, at hetta er eitt krav møguligir málbólkar longu seta til ferðamál sum Føroyar.

## Almen átøk

Støðugir karmar um marknaðarføring. Serligi strukturin við nógvum smáum veitarum ger tað alneyðugt við einum sterkum parti, sum bæði kann akkumulera vitan, vera nýskapandi, dríva verkætlanir, ráðgeva, marknaðarføra og síðst men ikki minst vera væl kjølfest í sjálvari vinnuni (álit). Fleiri av nevndu funktiónum eru best røktar av vinnuni sjálvari, meðan aðrar skulu loysast av tí almenna. Eitt endurskoðað Ferðaráð við serligari játtan, møguliga alment fíggjað men privat rikið, kann verða ein loysn.

Føroyar verða marknaðarførdar fyri vøkru og óspiltu náttúruna. At verja náttúruna er ein søk í sjálvum sær og krevur ikki eina orsøk. Men ferðavinnan nýtir náttúruna á ein hátt, ið kann órógva, dálka og í ringasta føri verða við til at skapa vistfrøðiligan ójavna. Tí krevst at mynduleikar, eigarar og ferðavinnan seta í verk skipanir, ið verja náttúruna.

Tey stóru flutningsfeløgini Atlantic Airways og Smyril Line rindaðu samanlagt kr. 18 mill. í ferðaavgjøldum í 2010 umframt havnagjøld og floghavnsgjøld. Avgjøldini eru við til at gera kappingarføri á altjóða marknaðinum verri, og er við til at lækka lønsemi í hesum feløgum. Avgjøldini mugu takast av og aðrir møguleikar til tess at fáa flogvøllin at bera seg mega troytast.

Innkeypsprísurin á rúsdrekka er tann sami hjá matstovum, sum í smásølu í handlunum, og tollfríu prísirnir eru ikki kappingarførir. Tí má bæði rúsdrekkalóg og toll lóg endurskoðast. Í matstovuvinnuni er tørvur á einum breiðum útboði bæði í sløgum og prísi. Príslegan á víni t.d. er ov høg til, at matstovur kunnu bjóða hágóðskuvín, og um somu tíð hava ein nøktandi vinning. Tollfrí søla er eitt munandi rakstrar ískoyti og virkar í kapping serliga við Kastrup Lufthavn og Flogvøllin í Reykjavík. Príshækkingar sum tær, ið hava verið í samband við fíggjarlógina fyri 2011, kunnu ikki í sama mun leggjast á søluprísirnar, og lækka tí úrtøkuna hjá felagnum beinleiðis.

Í Íslandi er innkeyp til gistingarhús og matstovur MVG frítikin. Ein slík skipan eigur at verða sett í verk í Føroyum eina tíð, soleiðis at vinnan fær møguleika at konsolidera seg og hækka tænastustøðið.

[14] www.qualmark.ac.nz

## *Samanumtikið*

Ferðavinnan gevur í dag eitt týðandi ískoyti til føroyska búskapin, men sum serstøk vinnugrein ikki sjónlig í sama mun. Orsøkin er, at hon er greinað út á nógvar ymiskar veitarar, sum tilsamans mynda undirstøðukervið í ferðavinnuni. Høvuðsveitararnir eru millumlanda flutningsfeløgini, gistingarhúsini og aðrir gistingarmøguleikar, matstovur, incoming fyritøkur, upplivingarvinnan og innlendis flutningur. Afturat hesum koma nógvar avleiddar vinnur. Henda spjaðing yvir ymiskar vinnugreinar er ikki serføroyskt, men tað er soleiðis ferðavinnan er bygd upp kring allan heim.

Neyðugt er tí við bæði formligum og óformligum samstørvum millum nógvar ymiskar partar í vinnuni og millum vinnuna og tað almenna. Tað almenna má átaka sær ein yvirskipaðan leiklut í at menna eitt innlendis samferðslukervi og slóða fyri átøkum, ið verja náttúruna. Vinnan má standa saman í virkisførum eindum, so hon er før fyri at loysa størri uppgávur innan trygd og góðsku, umframt at virka í samstørvum í Føroyum og uttanlands til frama fyri vinnuna.

Inntøkurnar mugu økjast bæði við øktum ferðafólkatali, í gjøldum fyri tænastuveitingar og við at lækka kostnaðir og avgjøld. Marknaðarátøk til tess at nýta avlopskapasitet uttanfyri háárstíð eru ígongd og byrja at geva ávøkstur. Møguleikar fyri vøkstur í ferðavinnuni eru sostatt fleirfaldir.

Gongdin í heimsbúskapinum hevur ongantíð verið truplari at meta um enn júst nú, og tí eigur ferðavinnan at verða fyrireikað uppá broytingar í ferðamynstrum og skjót at tillaga seg. Tað er heilt grundleggjandi, at fyritøkurnar fylgja væl við gongdini og eru fíggjarliga væl fyri til at møta framtíðar avbjóðingum.

## *Verkætlaninar*

### Verkætlanar - gongdin

Arbeiðið við verkætlanunum byrjaði 23. august 2010. Fyrsta tíðin var nýtt til at fáa yvirlit yvir øki, hvat var gjørt og hvat manglaði. Útgangsstøðið var at fáa veruligt nyttuvirði til vinnuna og "loypa á vognin" har vinnan er júst nú. Verkætlaninar snúgva seg um eina hagtalsskipan, útgreining av føroysku ferðavinnuni og at kortleggja sambandið millum Visit Faroe Islands og vinnuna.

## Hagtalsskipan

Málið við verkætlanini var at fáa sett nøkur hagtøl í verk, sum vísa vavið (nøgd av ferðafólki) og teirra heimstað. Hetta hevur eydnast fyri 2010, og avtalað er, at Ferðavinnufelagið heldur áfram við hesum skrásetingum mánaða fyri mánaða í 2011, soleiðis at hetta er byrjanin til at fáa hagtøl fyri ferðavinnuna í eina skipaða legu framyvir (sí annars pkt. Hagtøl 2003, 2009 og 2001). Verkætlanin er fíggjað av limunum í Ferðavinnufelagnum og Vinnuframagrunninum (50/50), og framhald er treytað av víðari fígging frá Vinnuframagrunninum.

## Hagtøl

Rættuliga skjótt sást, at nógv munagott arbeiði var gjørt til tess at lýsa øki “hagtøl”. Nevnast kann “Forundersøgelse af Databehov”, sum Hagstova Føroya og Ferðaráð Føroya lótu gera í 2002-03, og verkætlan, sum Visit Faroe Islands hevur latið úr hondum. Kortini vóru eingi hagtøl tøk fyri ferðavinnuna, og tí avgjørdi nevndin, at samskiparin skuldi savna seg um at savna og skipa nøkur hagtøl. Árið 2010 var longu komið væl áleiðis, og tí var vandi fyri eisini at missa hetta árið á gólvið. Men við sera góðum samstarvi við gistingarhúsini, flutningsfeløgini, Visit Faroe Islands, kunningarstovur og aðrar veitarar í vinnuni, hevur tað verið møguligt at savna inn álítandi hagtøl fyri 2010. Harafturat er ætlanin frameftir at fáa tølini mánaðarliga og at kunngera hagtøl hvønn ársfjórðing. Sum frálíður, og so hvørt orka er til tess, er ætlanin at víðka hagtølini, soleiðis at neyvt innlit fæst í allar tættir í ferðavinnuni. Annars verður víst til punktið Hagtøl á síðu 14.

## Greining av ferðavinnuni

Hvussu vinnan er samansett, og hvørjir veitarar eru í vinnuni, er málið við eini greining av ferðavinnuni. Ketan av bæði høvuðsveitarum og undirveitarum er long frá tí at ein bólkur hevur avgjørt at koma til Føroya og til hann er farin av landinum aftur. Marknaðarkanningar og marknaðarføring byrjar áðrenn og uppfylging skal kanska gerast aftaná. Málið við hesi verkætlan er at fáa eitt skipað yvirlit, sum kann nýtast av vinnuni sjálvari eins og av ferðafólki at leita upp møguleikar. Henda verkætlan er sera umfatandi, men sum, tá arbeiðið er gjørt, rúmar nógvar møguleikar fyri nýtslu.

## Lýsing av greiningar verkætlanini

Uppgávan er at útgreina og skráseta aktørar í føroysku ferðavinnuni. Útgreiningin tekur útgangsstøði í tænastuveitingunum. Hesar eru bólkaðar í nakrar høvuðsbólkar eftir slag av veiting t.d. Flutningur, Gisting, Upplivingar o.s.v. og í undirbólkar t.d. Flutningur er greinaður í Uttanlands Flúgving, Uttanlands Sigling, Bussar (túrar), Innlendis Rutuflutningur, Leigu Bilar, Hýruvognar o.s.v. Endamálið er at skapa møguleikar fyri, at brúkarin kann miðrætta leiting eftir tørvi t.d. at finna veitarar av eini ávísari tænastu, í einum ávísum øki, ávísa tíð á árinum. Tankin er, at brúkarin aloftast veit, hvørja tænastu hann hevur tørv á, men ikki altíð, hvør veitir tænastuna. Hinvegin skal skipanin eisini geva møguleika fyri einfaldari leiting, so sum at finna kontakt upplýsingar hjá einum ávísum felag. Í fyrstu atløgu er hetta ein skráseting og ikki ein meting av dygd í tænastu veitingini. Hinvegin, er hetta eitt grundleggjandi arbeiðið, sum, um skrásetingin verður dagførd, gevur

nógvar møguleikar fyri at taka stig víðari t.d. til sølu- og marknaðarføring á alnótini, góðskuskipanir, vinnumenning, samstørv í vinnugreinum og tvørfaklig samstørv v.m. Tá skrásetingin er liðug, má Ferðavinnufelagið taka støðu til, hvussu best nytta fæst burturúr og stig víðari.

## Kortlegging av sambandinum við Visit Faroe Islands

Um miðjan august 2010 hendu stórar broytingar á Visit Faroe Islands, ið høvdu við sær at fleiri fólk vórðu uppsøgd. Støðan hevur verið ræettuliga ógreið síðani, og tí hevur verið lítil meining í at kortleggja sambandið við Visit Faroe Islands. Samstarvið við starvsfólkini, ið eftir eru, hevur verið gott, og hevur m.a. viðvirkað til at komið er so væl áleiðis við hagtølunum. Men sum víst á aðrastaðni í frágreiðingini, er almenni leikluturin í ferðavinnuni als ikki nøktandi. Serligi bygnaðurin við nógvum smáum veitarum ger tað alneyðugt við einum sterkum almennum parti, sum bæði kann akkumulera vitan, vera nýskapandi, dríva yvirskipaðar verkætlanir, ráðgeva, marknaðarføra og síðst, men ikki minst verða væl kjølfest í sjálvari vinnuni. Fleiri av nevndu funktiónum eru best røktar av vinnuni sjálvari, meðan aðrar skulu loysast av tí almenna. Eitt endurskoðað Ferðaráð við serligari játtan, møguliga alment fíggjað men privat rikið, kann verða ein loysn.

# *Appendix*

## Innskrivingar á gistingarhús

| | 2009 Persónar | Meðal uppihald Dagar | 2010 Persónar | Meðal uppihald Dagar |
|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 12332 | 1,4 | 12407 | 1,7 |
| Danmark | 27728 | 2,1 | 27896 | 2,5 |
| Noreg | 3657 | 2,1 | 3679 | 2,5 |
| Ísland | 3263 | 1,9 | 3282 | 2,3 |
| Svørríki | 1600 | 1,9 | 1610 | 2,3 |
| Finnland | 666 | 2,1 | 670 | 2,5 |
| Grønland | 179 | 1,9 | 180 | 2,2 |
| UK/írland | 2241 | 1,9 | 2255 | 2,3 |
| Týskland | 1586 | 2,1 | 1595 | 2,6 |
| Frakland | 226 | 1,5 | 228 | 1,8 |
| Holland | 1232 | 1,4 | 1239 | 1,6 |
| Belgia | 123 | 1,4 | 123 | 1,6 |
| Eysturríki | 73 | 1,6 | 74 | 1,9 |
| Schweiz | 138 | 1,6 | 139 | 2,0 |
| Italia | 418 | 1,6 | 421 | 1,9 |
| Spani/Portugal | 106 | 1,2 | 107 | 1,5 |
| Europa annars | 922 | 1,6 | 928 | 2,0 |
| Japan | 60 | 1,7 | 60 | 2,1 |
| Russland | 64 | 1,0 | 64 | 1,2 |
| Asia annars | 7 | 0,8 | 7 | 1,0 |
| USA/Canada | 501 | 2,0 | 504 | 2,4 |
| Onnur lond | 550 | 1,7 | 553 | 2,1 |
| **Total** | **57672** | **1,9** | **58020** | **2,3** |

## Gistingar greinaðar á lond fyri 2003, 2009 og 2010

| **Bústaður** | **2003** | **%** | **2009** | **2010** | **%** |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 24405 | **27,1** | 18216 | 21422 | **16,2** |
| Danmark | 31571 | **35,1** | 60291 | 70902 | **53,5** |
| Noreg | 11104 | **12,3** | 7765 | 9132 | **6,9** |
| Ísland | 5253 | **5,8** | 6473 | 7612 | **5,7** |
| Svørríki | 2052 | **2,3** | 3198 | 3760 | **2,8** |
| Finnland | 681 | **0,8** | 1421 | 1671 | **1,3** |
| Grønland | | | 342 | 402 | **0,3** |
| UK/írland | 4820 | **5,4** | 4355 | 5122 | **3,9** |
| Týskland | 4149 | **4,6** | 3480 | 4093 | **3,1** |
| Frakland | 599 | **0,7** | 346 | 407 | **0,3** |
| Holland | 633 | **0,7** | 1730 | 2035 | **1,5** |
| Belgia | | | 172 | 203 | **0,2** |
| Eysturríki | 428 | **0,5** | 119 | 140 | **0,1** |
| Schweiz | | | 234 | 275 | **0,2** |
| Italia | 993 | **1,1** | 671 | 789 | **0,6** |
| Spania/Portugal | 249 | **0,3** | 133 | 156 | **0,1** |
| Europa annars | 1955 | **2,2** | 1547 | 1820 | **1,4** |
| Japan | 369 | **0,4** | 105 | 124 | **0,1** |
| Russland | | | 65 | 76 | **0,1** |
| Onnur lond í Asia | | | 6 | 7 | **0,0** |
| USA/Canada | 725 | **0,8** | 1043 | 1226 | **0,9** |
| Onnur lond | | | 989 | 1163 | **0,9** |
| **Samanlagt** | 89986 | **100** | 109210 | 132536 | **100,0** |
| | | | | | |
| **Index** | **100** | | **121,4** | **147,3** | |
| Broyting í % | | | 25,2 | 17,6 | |

Keldur: 2003 Hagstova Føroya
2009 Gistingarhús (80%)
2010 Gistingarhús (97%)

# Onnur gisting 2010

| | *Nætur/útleigað* | *Persónar* |
|---|---|---|
| **Summarhús** | 6581 | 13488 |
| **Ból og Biti, kamping og tjalding** | | 2923 |
| **Samanlagt** | | 16411 |

Hesi tøl eru ikki fullfýggjað og væntandi nakað hægri.

Keldur: In coming feløg, vallaraheim og kunningarstovur

**Ferðafólk sjóvegis – Tórshavn**

| | 2009 | 2010 |
|---|---|---|
| Frankaríki | 470 | 488 |
| Eysturríki | 78 | 64 |
| Australia | 5 | 13 |
| Belgien | 141 | 139 |
| Brasilien | | 2 |
| Canada | 5 | 13 |
| Sweis | 147 | 138 |
| Costa Rica | | 2 |
| Tjekoslovakíði | 328 | 430 |
| Týskland | 1887 | 1851 |
| Danmark | 7104 | 7315 |
| Dominikanska Republikkin | 2 | 2 |
| Estland | | 7 |
| Spanien | 26 | 33 |
| Finalnd | 7 | 19 |
| Falklands Oyggjarnar | 2 | 1 |
| Føroyar | 16361 | 17613 |
| Grønland | | 18 |
| Grikkaland | 7 | 9 |
| Kroatia | 2 | |
| Ungarn | 6 | 12 |
| Írland | | 3 |
| Ísland | 788 | 958 |
| Italien | 344 | 132 |
| Japan | 1 | |
| Litaven | 5 | 2 |
| Luxemburg | | 4 |
| Letland | | 3 |
| Niðurlond | 464 | 515 |
| Noreg | 341 | 250 |
| Polen | 144 | 71 |
| Portugal | | 2 |
| Rumenien | 2 | 12 |
| Rusland | | 4 |
| Svøríki | 173 | 159 |
| Stóra Bretland | 116 | 183 |
| USA | | 10 |
| Onnur lond | 10 | 16 |
| **Samanlagt** | **28966** | **30493** |

| | | |
|---|---|---|
| Føroyingar | 16361 | 17613 |
| Útlendingar | 12605 | 12880 |
| Beinleiðis t . Íslands - ikki íroknað | | 10000 |
| (steðgur uml. 3 tímar) | | |

Kelda: Smyril line

# Ferðafólk loftvegis 2010

| | 2010 | % |
|---|---|---|
| Føroyingar búsitandi í Føroyum | 124800 | 65 |
| Útlendingar | 67200 | 35 |
| **Samanlagt** | **192000** | |

| **Útlendingar eftir bústaði:** | | |
|---|---|---|
| Føroyingar búsitandi uttanlanda | 19200 | 10 |
| Danir | 28800 | 15 |
| Onnur (bretar, íslendarar og normenn) | 19200 | 10 |
| **Samanlagt** | **67200** | |

Kelda: Atlantic Airways

**Útlendsk ferðafólk - høvuðsbólkar**




Sjóvegis ferðafólk 2009-10 - Norrøna
Nøgd av ferðafólki
0
1000
2000
3000
4000
5000
6000
7000
8000
2010
2009
Frankaríki
Belgien
Sweis
Kekkia
Týskland
Danmark
Ísland
Italien
Niðurlond
Noreg
Polen
Svøríki
Stóra Bretland
Lond


Gistingar 2003, 2009 og 2010
Onnur lond
USA/Canada
Onnur lond í Asia
Russland
Japan
Europa annars
Spani/Portugal
Italia
Schweiz
Eysturríki
Belgia
Holland
Frakland
Týskland
UK/írland
Grønland
Finland
Svørríki
Ísland
Noreg
Danmark
Føroyar
0
10000
20000
30000
40000
50000
60000
70000
80000
2010
2009
2003